# 2 MIÓ Í AVLOPI

**AVLOP** – Vit fáa av og á at vita, hvussu gongdin er, og vit hava skilt, at virkisleiðslan væntar eitt enn betri ár í ár enn í fjør, sigur Tórgerð Gøthe

Vilmund Jacobsen

Tórgerð Gøthe, sum hevur arbeitt á Fiskavirkinum í Gøtu í samfull 25 ár út í eitt, sigur, at fiskaarbeiði á virkinum er rættiliga støðugt, og nú í seinastuni hava tey vanliga arbeitt í 10 tímar um dagin, frá 8-18.

– Vit hava eisini skilt, at tað gongur væl hjá okkara virki. Vit fáa av og á at vita, hvussu gongdin er, og leiðslan hevur sagt okkum, at seinasta ár gav einar 2 miljónir krónur í avlopi, samstundis sum leiðslan væntar, at árið í ár verður enn betri.

Á Fiskavirkinum í Gøtu síggja tey tí ljóst upp á framtíðina.

## Bara saltfiskur

Allur fiskurin, sum verður virkaður á virkinum í Gøtu, verður turrsaltaður.

– Fiskurin liggur fyrst í laka í eitt samdøgur. Síðan verður hann turrsaltaður og liggur í salti í umleið 9 samdøgur, til hann verður pakkaður til útflutnings.

Tórgerð Gøthe sigur, at á virkinum er ein flekimaskina og tríggjar flakamaskinur, sum verða brúktar til ymiskar støddir av fiski.

– Tann nógvi fiskurin verður skorin til flak og saltaður. Vit flekja ikki tær stóru nøgdirnar, men av og á verður flakt, og eg haldi, at hetta er, tá ávís viðskiftafólk mangla hesa vøru, sigur hon.

## 4.500 tons

Virkisleiðarin á Fiskavirkinum í Gøtu, Janus Rasmussen, sigur, at ráfiskanøgdin, sum virkið keypir og arbeiðir um árið, liggur eitt vanligt ár um 4.500 tons. Fiskasløgini eru serliga toskur, longa og brosma.

Hann sigur, at eitt vanligt ár liggur ráfiskanøgdin um 4.500 tons.

– Høvd, ryggir og innvølir verður alt selt Høvdavirkinum í Leirvík, sigur Janus Rasmussen.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Á Fiskavirkinum í Gøtu arbeiða fólk í øllum aldursbólkum – heilt frá skúlaungdómi til pensjónistar, harav nøkur arbeiðsfólk eru farin um tey sjeyti*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**LEIÐSLA**

*Virkisleiðarin, Janus Rasmussen, var sera fryntligur og vísti okkum runt á virkinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Á Fiskavirkinum í Gøtu síggja tey ljóst uppá framtíðina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

eitt vanligt flakavirki, har saltfiskur var ein partur av framleiðsluni. Nú í nøkur ár hevur virkið bara fingist við saltfisk, og fiskasløgini eru í stóran mun toskur, longa og brosma.

– Mær dámar væl at arbeiða í fiski, og tað siga tey 25 árini, eg havi starvast her, eisini. Men tað er eingin loyna, at eg viðhvørt kundi hugsað mær okkurt annað. Um vetrarnar er mangan kalt at standa á einum fiskavirkisgólvi. Hitaskipanin er frá gamlari tíð við blásarum undir loftinum, og hetta haldi eg ikki riggar so væl, sigur Tórgerð.

Hon vísir á, at nógvar ábøtur og útbyggingar av ymiskum slagi eru gjørdar á virkinum, síðan hon fyrstu ferð trein innar, og framvegis verður arbeitt við at bøta um umstøður og trivnað.

– Vit skulu avgjørt ikki klaga. Vit hava eina fitta og dugnaliga leiðslu, sum roynir at fáa tað besta burtur úr sínum arbeiðsfólki. Eg havi alt gott at bera teimum, og eg havi stóra virðing fyri Gregersen-monnunum sum vinnulívsmonnum, sigur hon.

Tórgerð Gøthe sigur, at kantinuumstøðurnar hava verið trongar leingi, men nú verður av álvara bøtt um hesi viðurskifti við tað, at stór og nýggj kantina verður bygd vestur úr virkisbygninginum.

– Uppi á takinum á kantinuni verður terass. Tey siga, at alt hetta arbeiði skal verða liðugt í september, og vit gleða okkum rættiliga nógv til tað, sigur hon.

*vilmund@sosialurin.fo*

**» ... hetta rópa vit »gásageiran«, tí her er kanska nakað trongligt at standa...**

TÓRGERÐ GØTHE

**» ... fiskurin liggur fyrst í laka í eitt samdøgur. Síðan verður hann turrsaltaður og liggur í salti í umleið 9 samdøgur...**

TÓRGERÐ GØTHE